# øroyska lyndinum



**Næstu ferð:**

*Kate Sanderson*

*- Víst er sosiala kontrollið sterkari í lokalsamfelagnum, men mín niðurstøða er framvegis, at tú hevur betri fortreytir fyri at liva eitt erligari lív í Føroyum, tí føroyingar vilja vita, hvør tú ert, áðrenn teir vilja vita, hvat tú gert. Í teimum mentanum, eg havi livað í, er tað umvent, sigur 70 ára gamla Renate Simonsen úr Sveits, sum hevur búð í Føroyum seinastu 39 árini*

*Mynd: Bárður Lydersen*

byrjanin til enn eina føroyska innrás í hennara lív, men um framtíðar maður hennara um hetta mundið hevði fingið gott eyga á henni og var farin at leingjast, er ikki heilt ósannlíkt.

- Um okkurt annað lá aftanfyri óseku heilsan hansara, veit eg ikki, sigur Renate, meðan hon flennir so hjartaliga. Í øllum førum fekk lítla fjarritið avleiðingar, tí eftir hetta gjørdi Renate ikki mætari enn at bjóða Sigurdi til Italia í aftursvari sínum.

- Mær tykti satt at siga synd í fyrrverandi stjóra mínum. Hann gjørdi eitt so stórt arbeiði fyri føroyska ferðavinnu, men samstundis hevði hann sjálvur einki sæð av verðini og hevði ferðast sera lítið. Tí bjóðaði eg honum til Rom, uttan at eg á nakran hátt hevði væntað, at hann fór at koma. Men hann kom, og vit ferðaðust saman víða, minnist Renate aftur.

Tá Sigurd fór heim, spurdi hann Renate, nær hon aftur fór at koma til Føroya, og av tí at tað var farið at ganga skeiva vegin á fyritøkuni í Rom, sá Renate aftur ein møguleika at leita sær norðureftir. Hon gjørdi av at flyta til Føroya á heysti í 1966, og stutt seinni gjørdust Sigurd og Renate par. Tey giftust í heimbygd hennara í Sveits tvey ár seinni og búsettu seg síðani í Føroyum, har tey hava verið síðani.

## Frælsir føroyingar

Sum fastur íbúgvi í Føroyum frá 1966 varnaðist Renate skjótt, hvussu øðrvísi føroyska lyndið var samanborið við hennara bakgrund í Sveits. Víst hevði hon verið í Føroyum fyrr, men nú upplivdi hon, hvør munur var á lísvhátti føroyinga samanborið við lívið á europeiska meginlandinum.

- Føroyingar eru hundrað prosent náttúrufólk. Tit eru spontan, impulsiv, fleksibul og á ein hátt sera elastisk. Føroyska lyndið gevur altíð rúm fyri broytingum og óvæntaðum viðurskiftum, og hetta er eftir mínum tykki ein fantastiskur eginleiki, sum virkaði heilt øvugtur fyri mær, tá eg av fystan tíð kom til Føroya, greiðir Renate frá.

- Ja, onkuntíð kundi eg gerast heilt forvirrað, leggur hon flennandi afturat. Hon sigur, at samanborið við føroyingar vaks hon sjálv upp í einum fastlæstum mentaliteti. Hennara bakgrund var eyðkend av, at alt skuldi leggjast til rættis út í æsir. Lívshátturin í Sveits var eyðmerktur av, at tað ikki var rúm fyri yvirraskilsum, og alt var fastlagt í føstum karmum.

- Tí var størsta broytingin fyri meg, hvussu frælsir og spontanir føroyingar eru. Hesir eginleikar hava eina frígerandi ávirkan, og tað hevur verið áhugavert at uppliva tveir so ymsar hættir at liva sítt lív uppá, sigur Renate Simonsen.

Og Renate hevur eisini hug at nevna aðrar dygdir við føroyska samfelagnum, sum hon ikki upplivdi í ymsu samfeløgunum, hon hevur verið partur av í Europa.

- Bæði í Italia og Sveits var fyribrigdið status altavgerandi. Tín persónur og títt lív varð definerað út frá, hvør støða tín var á arbeiðsmarknaðinum. Í Føroyum upplivdi eg harafturímóti, hvussu menniskjaligu og persónligu eginleikarnir í nógv størri mun verða virðismettir. Jú minni samfelagið er, jú tættari verða sosialu relatiónirnar, og jú meiri koma persónligu dygdirnar til sín rætt. Tí verður tú í Føroyum vurderaður meiri sum menniskja og minni sum út frá status-kriterium, sigur Renate Simonsen.

Samstundis sum sosialu relatiónirnar eru størri í einum lítlum samfelagi, verður mangan ført fram, at sosiala kontrollið eisini er størri. Lokalsamfelagið loyvir ikki sínum borgarum tann anonymitet, sum stórbýurin hevur at bjóða, og spurd, um eitt lítið samfelag sum Føroyar ikki eisini kann virka avmarkandi og bindandi fyri sínar íbúgvar, er Renate greið.

- Víst er sosiala kontrollið sterkari í lokalsamfelagnum, men mín niðurstøða er framvegis, at tú hevur betri fortreytir fyri at liva eitt erligari lív í Føroyum, tí føroyingar vilja vita, hvør tú ert, áðrenn teir vilja vita, hvat tú gert. Í teimum mentanum, eg havi livað í, er tað umvent, sigur Renate, sum vísir aftur, at hetta eru ov grovar generaliseringar.

- Sjálvsagt kann alt ikki skerast yvir ein kamb, men gjøgnum míni mongu ár á europeiska meginlandinum havi eg tó ongantíð upplivað tað, eg hitti í Føroyum. Tí var hetta ein broyting fyri meg. Føroyar hava tí lært meg ein nýggjan hátt at liva mítt lív uppá, ein erligari, meiri einfaldan og meiri menniskjaligan lívshátt, sum eg virðismeti og eri glað fyri at hava kent í so mong ár, sigur 70 ára gamla Renate Simonsen úr Sveits at enda.